# Skrivstovufólk

## fyristøðufólk

**Starvsfólkadeildin søkir eftir fyristøðufólki.**

**Vit bjóða**

Eitt sera spennandi og avbjóðandi starv innan starvsfólkaøkið hjá einum av størstu arbeiðsgevarunum í landinum, sum hevur umleið 900 fólk í starvi. Til tess at avgreiða lønir o.o. viðurskifti verður nýtt nýmótans tøkni, t.d. nýggj lønarskipan, elektronisk journal, klokkuskipan, heimabanki, teldupostur og internet. Neyðug skeið verða givin, so tú kanst menna teg persónliga og fakliga.

**Arbeiðsuppgávur**

Høvuðsuppgávan hjá fyristøðufólkinum er, við tilvísing til lønarfulltrúan, at hava ábyrgdina av lønaravgreiðsluni fyri allar stovnar og deildir hjá kommununi, og tryggja lønarútgjaldingarnar eru í tráð við ásetingarnar í sáttmálum og avtalum. Harumframt kemur tú at vera við til at taka tær av ymiskum starvsfólkamálum.

Nakrar av uppgávunum eru:

* At gera lýsingar eftir starvsfólki
* Avgreiða setunaravtalur og starvsváttanir
* Vera við til fíggjarætlanararbeiðið
* Vegleiða deildum og stovnum í starvsfólkamálum

**Førleikakrøv**

Neyðugt er at tú er hugaður fyri starvsfólkarøkt og yrkisviðurskiftum. Er nærlagdur, kann arbeiða sjálvstøðugt, er førur fyri at lýsa trupulleikar og finna bestu loysnirnar. At duga væl at samskifta, læra frá sær og at samráðast við bæði einstaklingar og starvsfólk er avgjørt ein fyrimunur.

**Setunarviðurskifti**

Starvið er fulltíðarstarv sum verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmálanum við Tórshavnar kommunala starvs- og tænastumannafelag.

**Meira fæst at vita**

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, ella Jens Marius Poulsen, kommunustjóra, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**

saman viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 24. juli 2000. Merk umsóknina "Fyristøðufólk".

Á starvsfólkadeildini, sum húsast í ráðhúsinum á Vaglinum, starvast í løtuni fýra fólk. Eisini eru tveir næmingar knýttir at deildini. Lønarútgjaldingin til tey umleið 900 starvsfólkini er umleið 110 mió. kr. um árið. Deildin umsitur fólk innan 14 sáttmálaøki.

# Hjálparfólk

**Býlingshúsið undir Brúnni søkir eftir hjálparfólkum.**

**Størvini**

Talan er um tvey avloysarastørv. Annað er eitt barnsburðaravloysarastarv á eini stovu við 10 børnum í aldrinum 0 - 3 ár. Arbeiðstíðin er 35 tímar um vikuna í tíðarskeiðnum 14. august 2000 til 1. mai 2001.

Hitt starvið er á eini stovu við 14 børnum í aldrinum 3 - 7 ár. Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna í tíðarskeiðnum 21. august 2000 til 1. februar 2001.

**Vit bjóða**

eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur stóran leiklut í gerandisdegnum.

**Vit ynskja**

At tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrum og starvsfeløgunum.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt og er førur fyri at taka avgerðir í arbeiði sínum.

**Setanarviðurskifti**

Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meir fæst at vita**

um størvini við at venda sær til Hervør Dam, leiðara, tlf. 319180, ella Katrin Petersen, samskipara tlf. 315160.

**Umsókn**

saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Býlingshúsinum undir Brúnni, Smærugøta 9b, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 30. juli 2000. Tilskila á umsóknina hvat starv tygum søkja.

Tórshavnar kommuna

**BILLUTIR**

ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR

F.A. BILLUTIR

tlf. 421605 fax 421666

**Góðir brúktir BILAR á goymslu**

Ein **Mercedes Benz C.220** diesel, 6 ár, koyrt 125.000 km, svartur metallakk, svart leður inntrekk, sentrallás, el-rútar, el-sóltak, ABS-bremsur, luftpútur, radio/kassettuspælara, mahogny interiør, servostýring og alu felgur

Ein **VW Passat TDi**, 5 ár, koyrt 115.000 km, grønur metallakk, el-spegl, servostýring, sentrallás, ABS, luftpútur og alu felgur

Ein **VW Vento TDi**, 5 ár, koyrt 140.000 km, reyður metallakk, alu felgur, sentrallás, el-spegl, elsóltak, ABS og luftpútur

Ein **Opel Vectra 1,7 TDi**, 5 ár, koyrt 124.000 km, myrkagrønur metallakk, sentrallás, el-sóltak, elrútar, el-spegl, servostýring og alu felgur

Ein **Toyota Carina II**, 11 ár, koyrt 153.000 km.

*Allir bilarnir eru í sera góðum standi og síggja út sum nýggir*

AUTO-VULK
FR-900 Vágur
Tlf. 373680 - 373660
Fax 374680
VULKANISERING OG BILVERKSTAÐUR

**PRENT?**

... troyttur av tokutalu og tilboðum, ið ikki halda, spyr ...

HESTPRENT Spf.
Dvørgastígur 7 • 100 Tórshavn
Tlf. 31 45 55 • Fax. 31 80 26
e-mail: hestoy@hestprent.fo

GEVIÐ BLÓÐ

# Kappríðing á ólavsøku



Tilmelding til kappríðingina í Marknagili ólavsøkudag kl. 15 er á tlf. 315242, 421643 og 215525 til týskvøldið 25. juli kl. 19. Ríðararnir skulu nýta hjálm. Ponyríðingin verður aftaná kappríðingina.

**Føroya Ríðingarfelag**

Sosialurin - 311820

**GRAVSTEINAR OG KANTSTEINAR. NÚ EISINI ÚR FØROYSKUM GRÓTI**

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

**Til útisetar í Danmark**
Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað

**Danstein**
Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

Skjót levering

Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961

RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN www.danstein.fo

Sosialurin - 311820

**Trygdarútgerð til øll endamál!**

• Verndarhjálmar og húgvur
• Hoyrivernd v/FM radio
• Brillur
• Maskur
• Trygdarskógvar
• Fallsikringar
• Handskar
• Hondreins
• Vit útvega skiltir til øll endamál!

Vit taka okkum av øllum uppgávum innan arbeiðaravernd

Tosið við okkum!

Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008